**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Sjúkrasystrar og almanna- og heilsuatstøðingar

Á B6 eru fleiri føst størv sum sjúkrasystrar og almanna- og heilsuatstøðingar í blandaðum vaktum, leys at søkja til setan sum skjótast eftir avtalu. Talan er um fulltíðarstørv, men møguleiki er fyri at avtala niðursetta tíð.

Deildin hevur leingi, tó serliga hesa síðstu tíðina, verið merkt av eini truplari hendingagongd, sum hevur ført við sær, at flestu starvsfólkini hava sagt seg úr starvi. Tí skal deildin byggjast upp av nýggjum, møguliga við øðrum uppgávum. Tørvur er tí á starvsfólki, sum hava hug og evni at seta í verk nýggj tiltøk.

Fyri at geva teimum verandi og nýggju starvsfólkunum eina góða byrjan saman, verður sett í verk felags innleiðsla til tær komandi uppgávurnar í deildini.

Deildin tekur, sum nú er, ímóti innkallaðum og akuttum sjúklingum alt samdøgrið. Hon hevur 18 seingjarpláss og hevur hesar sergreinar:

- gastroenterologi
- neurologi
- endokrinologi
- onkologi
- hæmatologi

Møguleiki er tó fyri at tað í samband við endurskoðanina av deildini verða framdar broytingar í hesi samanseting. Væntað verður at tey starvsfólk, sum sett verða tola hetta, og positivt verða við at leggja til rættis og fremja broytingarnar í verki.

Vit søkja eftir sjúkrasystrum og almanna-og heilsuatstøðingum, sum hava:
- viðkomandi útbúgving
- hug til at menna seg innan hesar sergreinar
- góð samstarvsevnir
- positiva menniskjaáskoðan
- áhuga fyri at vegleiða teimum lesandi
- evnir til at arbeiða við broytingum

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Helenu Dahl Olesen, deildarsjúkrasystir á telefon 31 35 40, lokal 106 ella Ásu Poulsen, yvirsjúkrasystir, lokal 300 ella e-post asap@ahs.fo

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmála Fíggjarmálastýrið og viðkomandi yrkisfelag.

**Umsóknarfreistin er:** 2. januar 2001 kl. 12.00.

Er hetta nakað fyri teg, so send eina skrivliga umsókn við avriti av prógvum, fyri sjúkrasystrarnar autorisatión og viðmælum til:

**Almanna- og heilsumálastýrið**
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
100 Tórshavn

## Pedagogar og hjálparfólk

### til Bústovnin og sambýlið á Mýruvegi 13 í Klaksvík

Treytað av góðkenning frá Fíggjarmálastýrinum eru innan Almanna- og Heilsumálastýrið og stovnar undir tí, við tænastu inntil víðari á Bústovninum og sambýlinum á Mýruvegi 13 í Klaksvík, hesi størv leys at søkja til setan 1. januar 2002 ella eftir nærri avtalu.

10 tænastumannastørv í lønarflokki 11-17 + viðbót í tænastufókasáttmálanum 3 hjálparfólkastørv á 14. lønarstigi í hjálparfólkasáttmálanum.

Størvini verða væntandi sett eftir sáttmálum millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag fyri tænastumenn ella hjálparfólk. Verða størvini ikki sett sum tænastumannastørv, verða tey sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálstýrið og Føroya Pedagogfelag fyri sáttmálasettar pedagogar.

Bústovnurin og sambýlið í Klaksvík er ein bústaður í tveimum eindum. Bústovnurin verður heim hjá fýra dreingum við autismu. Sambýlið veður heim hjá seks vaksnum menningartarnaðum fólkum.

Arbeiðsuppgávurnar hjá starvsfólkunum verða at taka sær av íbúgvunum og øðrum arbeiði í heiminum. Starvsfólkini verða í tí dagliga bert knýtt at aðrari av eindunum í húsinum.

Týdningur verður lagdur á, at umsøkjarar hava fakliga vitan um økið og eru áhugaðir í at útbúgva seg meira. Hava góð samstarvs- og innlivingarevni, eru kroppsliga væl fyri og ikki bangnir fyri at taka tøk.

Bert fólk, sum hava lokið námsfrøðiligt prógv ella líknandi prógv kunnu søkaj tænastumannastørvini. Um ikki nóg nógv útbúgvið fólk søkir hesi størv, verða tey fyribilssett við fólki við øðrum førleika. Nærri fæst at vit um størvini frá Jóhonnu Hansen, leiðara, á **tlf. 456310**. Umsóknarfreistin er **20. desember 2001** og skulu umsóknirnar sendast til:

**Bústovnin og Sambýlið**
Mýruvegur 13
Att. Leiðarin
700 Klaksvík

## Frá Maskin-meistarafelagnum

Aðalfundur felagsins verður í mars 2002. Nærri verður lýst seinni.

Sambært lógum felagsins skulu uppskot til stýrislimir vera felagnum skrivliga í hendi í seinasta lagi 15. desember 2001.

Limir, ið ikki kunnu møta á aðalfundinum, kunnu atkvøða við brævatkvøðu.

**Nevndin**

## Bilur við skaða til sølu

**Merki:** Toyota Hi-Ace Kassavognur (langur)
**Árg.:** 1998
**Km.:** 57.180

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
Fróði Müller, sýnsmaður
Tlf. 345727
fax. 345607

At hitta mánadag - hósdag millum kl. 9.00 - 10.00 fríggjadag milum kl. 9.00 - 16.00

## Mold fæst

við at taka ímóti henni.

Grót ynskist til keyps í Tórshavn.

**Tlf. 214727 ella 227255**

## Starvsfólk til Ferðaráð Føroya

Ferðaráð Føroya sóknast eftir einum starvsfólki til innlendisdeildina. Starvið er eitt fulltíðarstarv og verður at seta sum skjótast.

Arbeiðið fevnir um samskifti og samstarv við økisferðavinnufeløg, kommunur, aðrar myndugleikar og vinnuna um verkætlanir av ymsum slag.

Arbeiðið verður lagt til rættis í samstarvi við leiðsluna.

**Vit vænta, at umsøkjarin hevur hesar førleikar:**
- Útbúgving og royndir innan ferðavinnu og møguliga innan verkætlanarleiðslu
- Holla vitan um Føroyar sum ferðamannaland og føroysk viðurskifti sum heild, herundir vitan um flutnings-, gistingar- og útferðarmøguleikar
- Kunnleika til og um aktørar í ferðavinnuni
- Dugir væl at samskifta á føroyskum, donskum og enskum og hevur góðan teldufórleika.
- Hevur góð samstarvsevnir og dugir at arbeiða sjálvstøðugt

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og Starvsmannafelagið/viðkomandi yrkisfelag.

Skrivlig umsókn skal vera Ferðaráðnum í hendi, í seinasta lagi 28. desember 2001.

**Ferðaráð Føroya**
Postsmoga 118
110 Tórshavn

Ynskjast fleiri upplýsingar um starvið, kunnu áhugaði venda sær til leiðaran í Innlendisdeild Ferðaráðsins, Per Hansen, á telefon: 31 60 55 ella teldupost: per@tourist.fo

*Lesið Sosialin - tað loysir seg*



## 2 pedagogar til Dagstovnin á Oyri

**Søkt verður eftir:**
1 pedagogi at arbeiða 30 tímar um vikuna í vøggustovuni, at byrja 1. februar ella eftir nærri avtalu.

1 pedagogi at arbeiða 30 tímar um vikuna í Stórustovu, at byrja 1. februar ella eftir nærri avtalu. Starvið er fyribils eitt ár, við møguleika at halda fram á stovninum.

Dagstovnurin er normeraður til 40 børn uppdeild í 3 bólkar:

| | | |
|---|---|---|
| Stórustova | 17 børn | 4-7 ár |
| Innistova | 9 børn | 3-4 ár |
| Vøggustovan | 14 børn | 0-3 ár |

og vit eru 5 pedagogar og 6 hjálparfólk, sum stravast á stovninum.

Vit liggja í náttúruvinarligum umhvørvi við haga og fjøru og leggja stóran dent á at nýta hetta í gerandisdegnum.

Starvið verður lønt sambært sáttmála við Pedagogfelagið.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til leiðaran Rosu Prestá á **tlf. 422552** ella á **tlf. 227852**.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum, skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 21. desember og sendast til

SUNDA KOMMUNA
**Dagstovnin á Oyri**
450 Oyri

## Kvinna søkist til handil

Vit sóknast eftir tilkomnari kvinnu til handilin at byrja 2. januar 2002.

**Arbeiðtíðirnar eru hesar:**
kl. 05.30 - 13.15
kl. 13.00 - 19.00
allar dagar í vikuni

**Frants Restorff**
Tórsgøta 13
Tlf. 311060
Postmoga 41
110 Tórshavn

frants restorff

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Økispedagogur

**Enduruppslag**

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir økispedagogi.

Dagrøktarskipanin í Tórshavnar kommunu er normerað til 300 børn, og umleið 65 dagrøktarar starvast í skipanini.

**Arbeiðið fevnir m.a. um**
- vegleiðing av dagrøktarmammum
- at skipa fyri ymiskum tiltøkum
- foreldrasamstarv.

**Vit bjóða**
eitt áhugavert starv við nógvum fakligum og persónligum avbjóðingum.

**Vit ynskja**
at tú hevur royndir innan dagstovnaøkið, arbeiðir sjálvstøðugt og hevur lætt við at samstarva.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett 15. januar 2002 ella eftir nærri avtalu.

Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Brynhild Mohr Joensen, dagrøktarleiðara, ella Katrin Petersen, samskipara, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu vera Dagrøktarskipanini, postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 6. januar 2002.

Um eingin skikkaður pedagogur søkir, kann starvi verða sett tíðaravmarka til umsøkjara við viðkomandi útbúgving.

SNARSKIVAN

veng-føroyar

Plátulutir
Kúfangarir
Kølaragittar
Kølarir
Lyktir
Síðuspegl
Beriarnar
Bensintangar
www.veng.dk
Veng Føroyar
Fo-335 Leynar
Telefon 42 17 67 Telefax 42 17 68 veng@post.olivant.fo

## Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari
**BERGUR**
**Á REYNATRØÐ**
Børkuvegur, 620 Runavík
**Tlf. 448480**
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 9-16

## Skapa tær eitt arbeiðspláss

### ... og børnunum eitt spælipláss



**Til Útibarnagarðin í Runavíkar Kommunu, verður søkt eftir leiðara at byrja fyrst í 2002.**

Útibarnagarðurin fer at halda til í skúlanum í Lamba, sum verður útbygdur til endamálið. Á stovninum verða 25 børn í aldrinum 5-7 ár.

**Vit ynskja**, at tú ert útbúgvin pedagog, at tú dámar væl at vera úti í náttúruni, ert kreativ/ur, hevur hug og árræði at skapa ein fjøl-broyttan og tryggan dag saman við børnunum og hevur góð samstarvsevnir.

**Løn** smb. sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunurnar.

**Skrivlig umsókn**, saman við upplýsingum um útbúgvingar, royndir og møguligum viðmælum skulu verða kommununi í hendi í seinasta lagi 5/1-2002

**Runavíkar Kommuna**
Heiðavegur • FO-620 Saltangará
Tel. 41 70 00 • Fax 41 70 01
e-mail: runavik@runavik.fo

## Neil Brophy - solo show

"The modern day Trubadour"

upptraðkar fyri fyrstu ferð í Føroyum mikukvøldið 12/12.
Hann verður á Café Natúr til og við sunnukvøldið 16/12.



**Neil Brophy Band** hevur verið at sæð á ymiskum festivalum í Danmark - t.d.: Skagen, Nibe, Bork Havn & Fredriksund Folk & Vise

*livandi tónleikur*
CAFÉ NATÚR
Tlf. 31 26 25